Fróðskaparsetur Føroya

30. apríl 2004

# Frásøgn frá setursráðsfundi nr. 6/2004

Tíð: Hósdagin 29. apríl 2004, kl. 13 – 15.45

Fundarstaður: Setursskrivstovan

Á fundi: Malan Marnersdóttir, rektari
Jóan Pauli Joensen, vararektari, megindeildarráðsf. fyri SSD
Turið Sigurðardóttir, megindeildarráðsf. fyri FMD
Hans Pauli Joensen, megindeildarráðsf. fyri NVD
Annika Sølvará, setursskrivari (fór av fundinum, meðan pkt. 7 varð viðgjørt)

**Dagsskrá:**

1. **Gjøgnumgongd og góðkenning av 5/2004 setursráðsfundi 15. apríl 2004.** Orðingar diskuteraðar og góðkendar.

2. **Góðkenning av dagsskrá.** Góðkend.

**Mál at taka støðu til / umrøða:**

3. **Fíggjarmál.** (J.nr. 0015-00910). Fíggjarlógin fyri 2004 enn ikki samtykt. Skriv til Mentamálaráðið, dagfest 7.4.04, við viðmerkingum um avlopið í 2003 staðfest. Semja um at hava ein fíggjarfund at tosa um, hvussu fíggjarstýringin og eftirlitið kann leggjast betri til rættis. Fundur fyri setursráðið og deildarskrivararnar 10. mai kl. 10 á Setursskrivstovuni.

4. **Uppskot frá Náttúruvísindadeildini um at ganga burtur frá 3-ára tíðarskeiði av próvdómaragóðkenningum.** (J.nr. 0026-01334). *Fundarskjal: Skriv frá Náttúruvísindadeildini, dagfest 15.3.04, 1 s.* Semja um at tað er neyðugt at endurskoða próvdómaralistan av og á. 3 ára skeiðið er ásett í kunngerð um útbúgvingar á Fróðskaparsetrinum. Kanska heldur stutt, tí samtykt at biðja Mentamálaráðið leingja skeiðið til fimm ár, tá kunngerðin verður dagførd.

5. **Uppskot frá Føroyamálsdeildini um formligt tilknýti av leysalærarum.** (J.nr. 0041-01357). *Fundarskjal: Skriv frá Føroyamálsdeildini dagfest 22.4.04 við uppskoti, 2 s.* Drúgt kjak var um málið. Niðurstøðan var, at verandi starvsskipanarreglur dekka økið. Setursráðið kann gera av at lýsa eftir parttíðarsettum adjunktum og lektarum til tíðaravmarkaði størv. Av tí at tað er ein fíggjarspurningur skulu slík størv góðkennast av setursáðnum eins og øll onnur nýggj størv.


| Poststaður | Bústaður | Heimasíða | T-postur | Telefon | Faks |
|---|---|---|---|---|---|
| Postrúm 272<br>FO 110 Tórshavn | J. C. Svabos gøta 14<br>FO 100 Tórshavn | www.setur.fo | setur@setur.fo | 35 25 00 | 35 25 01 |

6. **Setan av jarðalisfrøðingi. Náttúruvísindadeildin skjýtur upp hesa metingarnevnd: Bjørn Ursin, professari, Norges teknisk-naturvitenskapelige Universitet NTNU, Trondheimi – Robert S. White, professari, University of Cambridge – Páll Einarsson, professari, Raunvísindastofnun Háskólans, Reykjavík.** (J.nr. 0021-01293). Góðkent. SSS avgreiðir málið.

7. **Setan av adjungeraðum lærarum á Søgu- og Samfelagsdeildini. Eftir tilmæli frá metingarnevndini mælir deildin til, at Andras Mortensen, savnvørður, Ph.D., og Hans Andrias Sølvará, studentaskúlalærari, cand.mag., verða knýttir at deildini sum ávikavist adjungeraður lektari og adjungeraður ammanuensis.** (J.nr. 0021-01096). *Fundarskjal: Tilmæli frá Søgu- og samfelagsdeildini, dagfest 15.04.04, 2 s.* Setursráðið samtykti at taka undir við at knýta Andras Mortensen at Søgu- og samfelagsdeildini sum adjungeraður lektari frá 1. august 2004.Ráðið tekur støðu til at seta Hans Andrias Sølvará í parttíðar adjunktstarv, tá fíggjarvánirnar loyva tí (sbr. pkt. 5). SSS avgreiðir málið.

8. **KT-deild á Fróðskaparsetrinum.** (J.nr. 0038-00958). *Fundarskjøl: Upprit frá Setursskrivstovuni, dagfest 16.4.04 , 4 s. og uppskot til fíggjarætlan frá SSS, dagfest 23.4.04, 4 s.* AS greiddi frá málinum, verandi ætlan, uppskoti til fíggjarætlan og alternativum møguleikum. Full semja um at stovna KT-tænastuna, treytað av at fíggjarlógaruppskotið verður samtykt óbroytt. Ætlanin er at yvirtaka Netumsitingina í verandi líki eftir avtalu við netumsitaran og hinar stovnarnar í samstarvinum. Mæla stovnunum til at seta eitt fyribils stýrið, sum skal gera starvslýsingar fyri bæði størvini. Uppskot til samanseting: Fimm umboð vegna ávikavist NVD/Setrið, FMD/SSD, SSS, Fiskirannsóknarstovuna, Landsbókasavnið/Náttúrugripasavnið/Landsskjalasavnið. Rektarin og setursskrivarin arbeiða víðari við málinum. Kalla inn til ein fund við netráðnum og stovnsleiðarunum í samstarvinum fyri at kunna um ætlanirnar og fáa tilsøgn um stuðul. Síðani biðja um góðkenning frá Mentamálaráðnum.

9. **Netsamstarvið og Internet-sambandið á Søgu- og Samfelagsdeildini.** (J.nr. 0038-01344). Fyribils meting av at leggja fipurkaðal frá Søgu- og samfelagsdeildini niðan til Savnshúsini er 100.000 kr. Setursráðið samtykti at játta neyðuga peningin av felags rakstrinum. Heitt verður á Netumsitingina og Søgu- og samfelagsdeildina um at taka sær av málinum.

10. **Kunning frá deildunum o.ø.:**
    a. **Fundur á Náttúruvísindadeildini 6.4.04.** (J.nr. 0011-00013). Einki at leggja afturat.
    b. **Fundur á Søgu- og Samfelagsdeildini 20.04.04.** (J.nr. 0011-00012). Einki at leggja afturat.
    c. **Fundur á Føroyamálsdeildini 22.04.04.** (J.nr. 0011-00011). Einki at leggja afturat.

    Deildirnar hava allar viðmerkingar til menningarætlanina, sum setursráðið samtykti á fundinum 15.4.04. Allar deildirnar ynskja at broyta raðfestingarnar, so tær samsvara betur við ynskini hjá teirra deild. Setursráðið samt um frá einum heildarsjónarmiðið at halda fast í raðfestingunum, sum eru samtyktar.

**Avgreiðslumál:**

11. **Eftir tilmæli frá Føroyamálsdeildini hevur Mentamálaráðið góðkent hesar próvdómarar: Bergur Hansen, cand.mag., Ph.D., Keypmannahavn – Páll Isholm, cand.mag., stjóri á Handilsskúlanum á Kambsdali – Hjalmar P. Petersen, M.A., avloysari fyri granskingarhjálpara á Føroyamálsdeildini. At staðfesta.** (J.nr. 0026-00781). Satðfest

**Kunningarmál:**

12. **Mánaðarjavni ultimo mars 2004, nýtsla fyri alt Fróðskaparsetrið 3.728.700 kr. .** (J.nr. 0015-01111).

13. **Frágreiðing frá Havnarkórinum frá Norðurlandatúrinum, sum var í oktober 2003. Kórið fekk stuðul frá Fróðskaparsetrinum av peningi setursins til føroyskt-norskt samstarv. Við skrivinum fylgdi ein royndarfløga við upptøkum frá túrinum.** (J.nr. 0073-01208).

14. **NUAS-NUS ráðstevnur:**
    a. **Í Turku 5.-8.6.04 "Exit – för innovativ kommunikation".** (J.nr. 0014-01345).
    b. **Í Nuuk 10.-14.8.04, ráðstevna fyri universitetsstjórar. Annika Sølvará luttekur.** (J.nr. 0014-01281).
    c. **Í Turku 19.-21.8.04 "Forskningen i samhällets tjänst".** (J.nr. 0014-01359).
    d. **Í Ålborg 25.-27.8.04 "Konkurrence – Samarbejde – Strategi – nye krav til universitetsforskningen giver forskningsadministratoren en nøglerolle".** (J.nr. 0014-01354).

15. **17. Altjóða ráðstevna um hægri útbúgvingar í Luxembourg 26.-28.8.04 "Fundraising for Universities".** (J.nr. 0057-00155).

16. **Ráðstevna um Útnorðursøgu VNH 12.-16.9.04 á Hotel Hafnia – sum liður í felagsverkætlanini "Om dokumentation, historieskrivning og formidling af de vestnordiske landes fælleshistorie". Søgu- og Samfelagsdeildin samskipar føroyska partin av verkætlanini.** (J.nr. 0056-01350).

Frágreiðing: Annika Sølvará